# Talgildar tænastur – útihýsa tær eisini?

So hvørt sum samskiftið millum borgarar og stovnar ella myndugleikar verður alt meira talgilt, verður hetta vanliga sæð sum ein fyrimunur, eisini fyri borgaran. Men tað eru tó nógv, sum ikki kunnu fáa lut í hesum fyrimuni. Talan er um fólk, sum hava torført við at samskifta og við at hava yvirlit yvir samansettar og mangan torskildar tilgongdir. Tað kann vera vegna afasi ella aðrar trupulleikar. Hesi menniskju verða sostatt útihýst úr felagsskapinum.

Talgildar skipanir verða mangan settar í verk, hóast tað ikki er kannað frammanundan, um allir bólkar, sum tær skuldu gagna, í veruleikanum fáa gagn av teimum. Hetta elvir til fólkaræðisligt undirskot. >>


Heilafelagið

Felagið fyri apopleksi – og afasirakt

Vitja okkum á Facebook!

>> Talgildar skipanir hava hjá mongum gjørt tað enn torførari at gjalda rokningar og hava yvirlit yvir síni peningaviðurskifti, lesa teldupost, søkja starv, bíleggja atgongumerki og ferðaseðlar og fylla út umsóknarbløð til stuðul av ymsum slag. Væntandi verða alsamt fleiri tænastur talgildar í framtíðini, eitt nú í heilsuverkinum. Hetta ber í sær, at nógv fólk verða enn meira bundin av hjálp frá øðrum til at avgreiða síni egnu viðurskifti.

## Betri møguleikar hjá øllum at vera partur av talgilda felagsskapinum krevur:

- At leiðreglur og ásetingar, som longu eru til viðvíkjandi talgilding, verða fylgdar.
- At talgildar skipanir verða royndarkoyrdar, áðrenn tær verða settar í verk - eisini av fólkum við afasi ella øðrum samskiftistrupulleikum.
- Tilboð um skeið og útbúgving í at nýta talgildar skipanir.
- Greiðar reglur fyri, hvat ein fulltrú til hjálpara fevnir um í teimum ymsu skipanunum, og betri upplýsing um, nær fulltrú krevst.
- Betri stundir í talgildum høpi, soleiðis at tað ber til at steðga á eina løtu uttan útritan.

## Aðrir møguleikar

Tað eru mong, sum av eini ella aðrari orsøk ikki kunnu nýta teir talgildu mátarnar at samskifta við stovnar og myndugleikar. Teimum skulu aðrir møguleikar standa í boði, uttan eyka kostnað.

https://www.facebook.com groups/193441641023004/